## Christian um skaðar hjá føroyskum spælarum

Flestu skaðar koma vegna óhepni. Fimleikur ger, at ein leikari verður sterkari og tolir tí meira av í einari takling. At spæla ov nógv á graslíki er heldur ikki tað besta fyri liðirnar.



## ... um Gunnar Nielsen

Hann er ein góður vinur, og vit finna væl út av at vera saman. Hann er seriøsur og er altíð 100% við. Hann er sterkur og er ein fantastiska góður málmaður. Hann hevur tað, sum skal til, sum ein leikari skal hava. Hann kann gera seg galdandi í einum stórfelagi.

# Christian smæðist ikk

**Hann er yrkisspælari í einum av stóru feløgunum í Onglandi, og hóast hann ikki enn hevur spælt á besta liðnum, so arbeiðir hann miðvíst fyri at koma longur – og hann smæðist ikki burtur í felagnum. Vit hava hitt Christian Restorff Mouritsen í Manchester**




## Ítróttarprofilurin



Ólavur Guttesen
post@sosialurin.fo

- Spæl til Christian.

Hesi orð munnu foreldur og onnur óivað hoyrt á fótbóltsvøllum kring Føroyar, tá dreingjaliðið hjá HB hevur spælt. Og tá Christian fekk bóltin hoyrdist stutt aftaná:

- Far sjálvur.

Tað hevur verið røddin á pápa Christian, Óli Mouritsen, sum hevur heppað á Christian. Sjálvur spældi hann við HB og B36 sum yngri, og var eisini úttikin til onkran landsliðsdyst.

Vit hava hitt Christian Restorff Mouritsen, sum nú er yrkisspælari í Manchester City.

Christian helt at samrøðan skuldi gerast á MacDonald Hotel í Manchester. Undirritaði ímyndaði sær stólar formaðir sum kips og borðini sum burgarar, og var í iva hvussu tað fór at fara fram. Eitt MacDonald hotell hevði hann ongantið hoyrt um áður. Tað skuldi tó vísa seg, at MacDonald Hotel er ein marglætis hotelketa við mongum hotellum í Evropa, og hevur bert navnið í felag við kendu matstovuna.

Vit byrja samrøðuna, men við ongum kipsi ella burgarum afturvið.

### Yrkisleiðin tekur skap

Christian byrjaði sum 7 ára gamal at leika við HB, tá ein vinur lokkaði hann at koma at venja innandura. Tað dámdi honum so mikið væl, at hann helt á at venja.

Sum 12 ára gamal varð hann úttikin til U14 landsliðið, og tann hendingin hevur broytt hansara lív.

Christian var yngsti leikarin á liðinum, og har vóru aðrir størri og betri leikarar enn Christian. Hann slapp tó at byrja inni, og frá tí degi hevur hann trúð á seg sjálvan og ment eitt sunt og gott sjálvsálit.

Christian leikti á U14 landsliðinum og slapp eisini at royna seg sum 13 ára gamal á U17 landsliðinum. Á U17 liðinum skoraði hann millum annað sigursmálið móti Danmark. Føroyar fingu fríspark í 30 metra fjarstøðu. Christian leggur bóltin til rættis, høggur til, og bólturin sat í meskunum.

### Royndarvenjingar í útlandinum

Hansara avrik á landsliðinum høvdu við sær, at stórur áhugi var fyri honum uttanlands. Lið úr Danmark og Onglandi høvdu eyguni eftir honum og vildu hava hann til royndarvenjingar.

Fyrsta liðið, Christian royndarvandi við, var Brøndby. Tað var fyrstu ferð, at Christian royndarvandi uttanlands, tí hevði hann tað ikki lætt at fella inn í ferðina í spælinum, og einki spurdist burturúr.

Ikki langt aftaná vóru boð eftir honum úr Frem Boldklub, men har dámdi honum einki serligt, so har spurdist einki burtuúr.

Síðani fór leiðin til Everton í Onglandi, har hann og Jóhan Davidsen royndu seg. Bert Jóhan fekk bjóða sáttmála. Sjálvt um eingin sáttmálið spurdist burturúr, fekk hann at vita frá felaganum, at hann hevði gjørt eitt gott árin.